Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Niels R. Finsen:

# 100 ár síðan Finsen fekk Nobel heiðurslønina

**Í dag, mikudagin 10. desember, eru liðin hundrað ár síðan Niels Ryberg Finsen fekk Nobel heiðurslønina í Fysiologi og Medisin**

Niels R. Finsen varð føddur í Havn 15. desember 1860. Foreldrini vóru: Johanne Sofie Formann, ið var donsk, og Hannes Finsen, ið var føddur í Reykjavík og gjørdist í 1858 fúti og seinni amtmaður í Føroyum.

Pápin, Hannes Finsen, var ein friðarligur og duggandi embætismaður, lítillátin, men heldur heilsuveikur. Mamman er søgd at hava verið bæði vøkur og yndislig, altíð blíoygd og glaðlynt, men hon doyði longu í 1864.

Niels livdi síni barnaár í Havn, til hann sum umleið 14 ára gamal, í 1874, var sendur til Herlufsholm í Danmark at lesa, men illa gekst, hugurin til at ganga í skúla var lítil og eingin. Hann kom heim aftur, og í 1876 bleiv hann sendur til Reykjavíkar, har hann bleiv studentur í 1882, sum 21 ára gamal.

Eftir tað var hann eitt skifti í Føroyum og fór síðan til Danmarkar at lesa til lækna. Í Keypmannahavn flutti hann sum føroyingur inn á Regensen og kom at búgva saman við fleiri seinni kendum føroyingum. Hugurin til bókina var kanska ikki av tí besta, betur dámdi honum allan ítrótt. Hann var tann fyrsti, sum í Keypmannahavn fór undir venjingar í fimleiki, og hann var framúr góður byrsumaður og vann fleiri kappingar við riflu.

Á sumri 1890, tá hann var 29 ára gamal, fekk hann prógv sum lækni og fekk starv hjá professaranum í kroppsbygnaði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Hetta starvið kom at eiga lívið í honum tey komandi árini og gjørdi, at hann seinni óbundin kundi fara undir ljósrannsóknirnar. Hann var av hegnigastu monnum og hansara gávur og sjáldsama tol komu væl við, tá hann seinni fór undir ljósviðgerðir sínar.

Hann fekk eina sjáldsama hjartasjúku sum so líðandi vant upp á seg og tey komandi árini tarnaði honum í hansara rannsóknararbeiði. Hann sigur sjálvur frá, at tað var hendan sjúkan, ið gjørdi, at hann fór at geva sólarljósinum gætur, hann kendi seg meira mentan, har sólin sá, og var hann samstundis varur við at flestu djórini leitaðu úr skugganum og út í ljósið. Hann sá at í sólarljósinum býr grøðandi megi, og hendan hugsanin búnaðist í honum til vissu, so hvørt rannsóknir hansara tóku seg fram.

Í desember 1892 giftist hann við Ingeborg Balslev, dóttir Ribe-bispin, ið kom at verða honum ein hollur stuðul.

Tað ið menn tá á døgum vistu um ljósið í sambandi við livandi hold var so at siga einki.

Fyrsta ritgerðin hjá Finsen um ljósið kom í 1893, og var hon eins og alt, ið hann lat úr hondum, sermerkt av skilvísari hugsan og so einfaldum royndum, at hvørt mansbarn skilir hana.



*Niels Ryberg Finsen, 1860-1904, varð føddur og vaks upp í Havn. Fyri hundrað árum síðan fekk hann Nobelheiðurslønina í Fysiologi og Medisin*

Næsta ritgerð hansara kom í 1895, og var hon um ljósið sum lívkveikara. Royndirnar hevði hann gjørt við ikki fullklaktum eggum undan froskdjórinum salamandri. Eisini gjørdi hann royndir við smádjórum, ið vanliga skíggjaðu ljós, til at vita hvat í ljósinum tað var, sum bar teimum ímóti. Hann nýtti t.d. reyðmaðkar, tvístertur og svartaklukkur. Koyrdi tey í kassa við ymiskt littum gløsum til lok og lat sólina skína á. Altíð sluppu djórini sær við miklum skundi undir reyðu gløsini, tí hesir ljósgeislar gjørdu minst um seg. Úr hesum einfaldu royndum fær Finsen tað hugskot, at í sólarljósinum er onnur megi enn ljós og hiti. Har eru eisini teir violettu sjónligu og ósjónligu geislarnir. Hann nevnir teir evnisbroytandi geislarnar, og tað er um hesar geislar, at alt lívsyrki hansara síðan snýr seg um.

Ongantíð misti Finsen úr eygsjón tað, ið hann sjálvur av fyrstan tíð hevði lagt mestan dentin á - heilsubótarmegina í ljósinum. Eisini eydnaðist tað honum at fáa í lag "ljósbað Finsens", tey kalla, hóast hann ikki kom at liva nóg leingi til at rannsaka hetta til fulnar. Fólk sum høvdu sjúkuna "Lupus Vulgaris", ið var ein hervilig húðsjúka, blivu lekt av ljósinum. Nú á døgum eru tað fá sjúkrahús, sum ikki nýta ljósið til viðgerðir av ymsum sjúkum.

10. desember 1903 fekk hann Nobelheiðurslønina í Fysiologi og Medisin. Árið eftir, tann 24. september 1904, andaðist Niels Ryberg Finsen, bert 43 ára gamal.

Í Føroyum hava vit ein minnisvarða um Niels R. Finsen við inngongdina til húsini hjá Ríkisumboðnum í Laðabrekku í Havn.

*Kelda: Gluggin, Hans Debes Joensen*




*Plátan í minnisvarðanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Nobelheiðurslønin sum Niels R. Finsen fekk 10. desember 1903*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Minnisvarðin um Niels R. Finsen við inngongdina til garðin hjá Ríkisumboðnum í Laðabrekku í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Gomlu amtmanshúsini. Her búði Neils R. Finsen barnaár síni. Húsini stóðu inni í garðinum hjá Ríkisumboðnum*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



## Ørvur Thomassen 60 ár



Í dag 10. desember fyllir Ørvur Thomassen 60 ár. Hann er sonur Sunnevu f. Gøthe úr Norðagøtu og Michael Thomassen, sála (Mikk skómakarin) av Viðareiði. Tey bæði vóru asfaltføroyingar, sum føroyingar, innistongdir í Keypmannahavn undir krígnum - vóru kallaðir. Tað segðist um hesar útisetar, at tey kappaðust um at geva børnum sínum mergja føroysk nøvn.

Íkastið hjá Sunnevu og Mikk til hesa kapping var Ørvur, sum var teirra fyrstiføddi. Í dag eru helst nógvir Ørvar, men hann var sum smádrongur einnevndur í Klaksvík.

15 ára gamal fór hann úr skúlanum og til skips við Viðoynni til Grønlands. Longu áðrenn teir komu á fiskileið, tóku teir í ruskveðri manningina av einum portugisiskum fiskiskipi, ið hevði siglt á ein boða uttan fyri Føroyingahavnina við 84 monnum umborð. Tá var trongt í lugarinum á Viðoynni. 2 ár seinni var hann við Skálanes, tá hon brendi og sakk á Fyllabank. Aftaná sjómansháskúlan í Svendborg byrjaði Ørvur sum stýrimansnæmingur hjá MÆRSK. Væl mundi hann roynast, tí boð komu eftir honum at koma og sigla við frítíðarbátinum KLEM hjá sjálvum reiðaranum, navnframa Mærsk Mc-Kinney Møller. Har var hann eitt skifti, til hann byrjaði á sjómansskúlanum í Havn. Eftir lokið prógv var hann stýrimaður hjá DFDS fyrst við Prinsinum og so við England, ið tá sigldi uppá Føroyar um summarið.

Ørvur var verandi hjá DFDS, har hann gjørdist ein av yngstu kapteynunum. Og har er hann enn.

Nógv er broytt, síðani hann byrjaði at fiska í sjálvdrátti, har teir eisini skóru lippur, og at sigla úti meira enn 1 ár í senn uttan at sleppa heim, - og nú tey seinnu árini at sigla í fastari rutu millum Svøríki og Ongland 14 dagar í senn og so heim. Nú verður nærum flogið líka nógv, sum tað verður siglt.

Ørvur giftist Edith Lamhauge úr Vági, har tey settu búgv. Edith doyði í 1996. Í hjúnalagnum eru tveir synir, Ronnie og Súni - annar samfelagsfrøðingur, og hin verður tað í næstum.

Seinni giftist Ørvur uppaftur við Karini Kjølbro. Tey bæði fylgdust í skúla í Klaksvík í 1950. Tey búgva á Argjahøvda. Tá tey ikki ganga í haga ella á fjøllunum, dámar teimum at arbeiða bæði inni og uttandura. Ikki er tað sørt, tað tey fáa á skafti.

Ørvur er í hesum døgum í Norðsjónum, men niðurteljingin er byrjað. Tá hann fer í land komandi summar, hevur hann verið á sjónum í 45 ár, og tá kann hann í øllum veðri sita fjálgur innandura og síggja hvørt einasta far, sum fer inn og út úr Tórshavnar Havn og fegnast um, at nú skal hann ikki avstað aftur. Vit ynskja Ørvi hjartaliga tillukku við degnum.

## Nelly Sørensen 75 ár



Sunnudagin 7. desember fylti Nelly Sørensen í Havn 75 ár. Nelly er fødd og uppvaksin í Nólsoy, foreldirni vóru Suffía og Niels í Liða. Nelly var yngst av fimm systkjum, fýra brøður vóru eldri.

Sum ung fór hon til Havnar undir krígnum, helst í 1942 og starvaðist á Telefonstøðini.

Í Havn hitti hon Otto Sørensen úr Porkeri, sum kom til Havnar í 1944 og lærdi til krambarkall í Skipshandlinum. Tey giftust í 1950 og settu búgv í Leivsgøtu 13 í Havn, har tey hava búð síðan.

Tey fingu trý børn: Nils í 1952, Sunnvu í 1956 og Katrin í 1963.

Nelly hevur í nógv ár verið virkin í samkomuni í Ebenezer, serliga tá ið tað snýr um ábyrgdina av matgerðini í sambandi við veitslur, føðingardagar, brúdleyp og ervir. Hon er rólig og hevur gott yvirblikk, um matgerast skal fyri fleiri hundað fólkum.

Á Zarepta hevur hon øll árini staðið fyri matgerðini á leguni fyri tey menningartarnaðu. Tað sigur nakað um hennara sosiala engagement og umsorganina fyri teim veiku í samfelagnum. Hon vísir eisini sína styrki, tá sorgin bankar á dyrnar, bæði við troyst og praktiskari hjálp.

Nelly var heimaarbeiðandi meðan børnini vóru smá. Tá tey vóru vaksin, fekk hon starv í Skipshandlinum hjá Talu og Jógvan á Dul og seinni P/F Vónini. Hon var í 25 ár í Skipshandlinum, til hon gavst, 70 ára gomul.

Nelly og Otto eiga seks ommu- og abbabørn.

## Dagurin

**10. desember. Judit.** Apokryfiska bókin í Gamla testamenti greiðir frá konubrotinum Judit, sum høgdi høvdi av herhøvdinganum Holofernes.

Navnið er bíbilskt og merkir *jødakvinna*.

# Else Gotved Jacobsen sjeyti



Í dag mikudagin 10. des ember 2003 fyllir Else Gotved (gift Jacobsen) í Dr. Dahlsgøtu í Sandágerði í Havn 70 ár.

Else starvaðist heili 30 ár á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, áður Statshospitalinum, sum byrjaði sítt slóðbrótandi verk fyri sinnisveik seinast í seksti- og fyrst í sjeytiárunum.

Og ikki hevur Else tað frá fremmandum, hetta tað skapandi og linnandi virksemið fyri likam og sál.

Hon vaks upp á Frederiksberg í Keypmannahavn. Mamman er víða kend, virkin og mikið heiðrað innan fimleikapedagogikk, setti í tí sambandi á stovn sín egna lærustovn, læt úr hondum mangar fakbókmentir og veitti frálæru gjøgnum fjølmiðlar.

Pápin var starvsliga eisini virkin innan fimleikin, var annars listafólk og prýddi sum so mangar bøkur. Else er elst av 5 systkjum. Systirin er jarðarmóðir, og teir tríggir brøðurnir arkitektur, bóndi og musikari, og yvirhøvur tykist tónleikur at hava verið nógv frammi í ættini hjá Elsu, hóast eg ikki veit Elsu sjálva hava útfoldað seg akkurát innan tað.

Men afturfyri hevur hon so átt handalag og tey í so máta skapandi evnini umframt eitt spaklynt, fjálgt og vinnandi háttalag, sum hevur kunna dugnað so mongum av teimum allarveikastu í okkara samfelag.

Hon nam sær nevniliga yrkisútbúgving sum ergoterapeutur á sjúkrahúsinum í Glostrup, giftist móti ársenda í 1961 við Sólbirni Jacobsen úr Fuglafirði, og fluttu tey saman til Føroya í 1968, har maðurin gjørdist telefonverkstjóri, samstundis sum Else fekk arbeiði sum ergoterapeutur á tí tá lidna Statshospitalinum, seinni psykiatrisku deild.

Maðurin, Sólbjørn, er eisini úr góðum bergi brotin, sonur Edward skipara á m.ø. Boðasteini, sum vit kenna úr flagg- og skipasøgu okkara. Teir, sum staddir millum lond við krígsbyrjan á Norðurhøvum lótu føroyskt flagg evna til úr einum mjølsekki, vundu tað á stong og annars brúktu hetta heimagjørda merki í mong ár á sjónum.

Else og Sólbjørn fluttu sum nevnt til Føroya í 1968 og bygdu sær eitt vala heim í Dr. Dahlsgøtu úti í Sandagerði, har mangur man hava sitið væl hjá hesum vinsælu og hugnaligu hjúnum, Sólbjørn, hugfarsligur, matglaður og góður kokkur, og Else, sum við sínum spaklynta, flógva humori, ídni og ordanssansi hevur viðvirkað so væl til innanhýsis hugnan.

Else og Sólbjørn fingu børnini Lars, sum er maskinmeistaraútbúgvin og í starvi hjá kendu motorverksmiðjuni BW/Man í Keypmannahavn, Gunnvá, sum er útbúgvin bromatologur (matvøruverkfrøðingur), og at enda er tað so Lisbeth, sum er talupedagogvur og í løtuni arbeiðir á Sernámsdeplinum og í Stuðulsfólkaskipanini.

Ommubørnini eru umsíðir vorðin 6 væntar í tali, og nú Else sær sjálvari lík lítillátin og familjukær hevur valt at vera burturstødd føðingardagin, so er tað tí at sonurin um hetta sama mundið fyllir 40, umframt at hon væntar at kunna taka ímóti enn einum ommubarni.

Else fór frá fyri aldur ár 2000, men hevur fyri tað als ikki lagt virkisárarnar inn. Familjukær sum tey eru, hava tey fingið betri stundir og høvi til at vera um hvønn annan ,børnini og ikki minst barnabørnini, eins og tey hava eitt virkið frítíðarlív. Sólbjørn við sínum kæra báti og øðrum áhugamálum og Else, ja hon hevur als ikki slept sínum fakliga yrki, men drívur alsamt á at lata úr hondum dygdararbeiði innan handarbeiði, verið tað seg innan myndavevnað ella at binda fyri Heimavirkið. Men henni átøkt so ger hon framvegis lítið burtur úr sær sjálvari, sýnir ikki fram síni handaligu avrik alment.

Í fríløtum gongur hon annars nógv á fjøllunum, er sera virkin limur í Fuglafrøðingafelagnum og Gongufelagnum og man ivaleyst vera tann upprunadani í Føroyum, sum í verki er mest kunnig við føroysku náttúruna, eins og hon javnan fær hugskot úr sínum náttúruupplivingum til síni listarligu avrik. Hon er eisini røsk at lesa, og mær er sagt, at tá hon og Sólbjørn á sinni skuldu á eina ísraelsferð, lósu tey sum fyrireiking bíbliuna umaftur á tamb væl og virðiliga umframt nógv annað lestrartilfar viðkomandi fyri ferðina.

Góða Elsa, fari, hóast tú í tínum spakføri og lítillætni helst hevði viljað verið hesa lítisverdu heilsan fyri uttan, at takka tær fyri øll tey mongu starvsárini saman við tær úti á Statshospitalinum, núverandi psykiatrisku deild, og fari at takka tær fyri tín spaklynta, men holla og flógva máta at vera uppá, títt treytaleysa samhaldsfesti og saman við Kirstini, starvsfelaga, tína umfevnandi umsorgan fyri teimum allarveikastu og mest einsamøllu í viðgerðarhópinum og í so máta tína sunnu fornuft og tol at lurta.

Árini eru umsíðir vorðin mong og nú tynnist av álvara ímillum pionérarnar á psykiatrisku deild, har tú so avgjørt átti tín leiklut. Eftir eru bert Kirstin, samstarvsfelagi tín øll tíni ár, og nakrar fáar sjúkrasystrar, sum eisini skjótt falla fyri aldur.

Takk fyri títt íkast til vala verk og eitt gott og viðkomandi arbeiðslív saman við ynski um eitt framhaldandi virki og eydnusamt otium saman við tínum og vónandi okkum mongu tykkara vinum við.

**EyJo**